**Ískoytisavtala til høvuðssáttmálarnar**

**millum**

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

**og**

**Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag**

## Grein 1

Omanfyri nevndu partar eru samdir um, at

- tá talan er um verkætlanir innan byggivinnuna
- har í minsta lagi 8 arbeiðsfólk eru tengd at verkætlanini og
- arbeiðið eftir ætlan skal vara í minsta lagi 3 mánaðir

kunnu lønarviðurskiftini verða sum ásett í hesari ískoytisavtalu.

## Grein 2

Stk. 1 Arbeitt kann verða sambært hesi grein í antin 8-tíma degi, 16-tíma degi í tíðarskeiðnum 07 – 24 ella 24-tíma degi mánadag til fríggjadag. Leygardag, sunnudag, halgidagar og frídagar sambært høvuðssáttmálanum verður lønt sambært høvuðssáttmálanum eins og arbeiði uttanfyri nevndu arbeiðsskipanir.

Sama arbeiðstíð er galdandi fyri øll arbeiðsfólk á arbeiðsplássinum, treytað av at talan er um somu arbeiðsuppgávur. Um skift verður frá einari skipan til aðra, skal hetta fráboðast í minsta lagi 24 tímar frammanundan.

Stk. 2. Um arbeitt verður 8-tíma dag, verða lønarásetingarnar í høvuðssáttmálanum galdandi óbroyttar, umframt møguliga yvirtíð.

Stk. 3. Um arbeitt verður 16-tíma dag (8 tímar hvørja vakt), verður tímalønin 130,00 kr, umframt viðkomandi viðbøtur í § 4 og § 5 í høvuðssáttmálanum og møguligar starvstíðarviðbøtur. Verður arbeitt fleiri enn 8 tímar á vaktini, verða teir tímar, sum eru umframt teir 8 tímarnar, løntir sambært lønarásetingunum í høvuðssáttmálanum.

Stk. 4. Um arbeitt verður 24-tíma dag (2-skifti ella 3-skifti vakt), verður tímalønin 139,00 kr, umframt viðkomandi viðbøtur í § 4 og § 5 í høvuðssáttmálanum og møguligar starvstíðarviðbøtur.

Stk. 5. Døgurðasteðgurin á 20 min. verður ikki frádrigin, ella verður hildin sambært sáttmálanum. Um arbeitt verður í skiftum, so verður mattíðin ikki frádrigin fyri 2. og 3. holdið. Kaffisteðgir verða praktiseraðir soleiðis sum tað higartil hevur verið gjørt.

K4MR

Stk. 7. Um arbeitt verður í skiftum, skal miðjast ímóti at hava nøkulunda eins stór hold, sum skiftast um vaktirnar hvørja viku.

## Grein 3

Stk. 1. Henda ískoytisavtala er ikki galdandi fyri verkætlanir, har byggiavtala er gjørd, og arbeiðið er byrjað, áðrenn ískoytisavtalan kom í gildi.

Stk. 2. Hóast ískoytisavtalan fer úr gildi, verður hon framhaldandi at galda fyri verkætlanir, har byggiavtala er gjørd, meðan hon var í gildi.

## Grein 4

Stk. 1. Har annað ikki er tilskilað í hesari avtalu, eru ásetingarnar í høvuðssáttmálanum galdandi, m.a. reglurnar um eftirløn.

Stk. 2. Feløgini hava rætt til at fáa útflýggja yvirlit yvir starvsfólk, sum eru sett sambært hesum sáttmála.

## Grein 5

Henda ískoytisavtala er sum royndartíð fyribils galdandi fram til 1. mai 2014, sí tó grein 3, stk. 2.

2. november 2012

Føroya Arbeiðsgevarafelag

Føroya Arbeiðarafelag

Havnar Arbeiðsmannafelag